## Tvey tíðindafólk úr Føroyum

Tvey tíðindafólk úr Føroyum vóru beinleiðis við á Vestnorden Travel Mart, eitt tíðindafólk úr Kringvarpinum og eitt umboðandi miðlarnar, sum Miðlahúsið eigur og rekur. Umstøðurnar hjá tíðindafólki vóru annars góðar, og tey fingu góð hølir at vera í á stóra Scandic Copenhagen hotellinum, har ferðavinnustevnan varð hildin. Tó at Ísland hevði størstu umboðanina á Vestnorden Travel Mart, vóru eingi íslendsk tíðindafólk at síggja í hesum rúmi, meðan stevnan var. Hinvegin vóru tveir tíðindamenn, sum skriva fyri grønlendsk bløð og tíðarrit.



# Positivt at verða við á Travel Mart



Eins og íslendska ferðavinnan í síni heild, hevur eisini Hotel Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík merkt, at meira hevur verið at gjørt í ár. Gistingarnar í fjør vóru umleið 7.000, og tær verða eftir øllum at døma ikki færri í ár

Mynd: Álvur Haraldsen

**Jóan Karl Høgnesen, sum starvaðist hjá donsku sjóverjuni í samfull 23 ár tilsamans, hevur nú í hálvt annað ár verið leiðari á Ørkini í Reykjavík. Vit hittu hann á ferðavinnustevnuni, Vestnorden Travel Mart í Keypmannahavn hósdagin, tá stevnan nærkaðist endanum**

TRAVEL MART
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leiðarin á Hotel Sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík, Jóan Karl Høgnesen, var partur á íslendsku luttøkuni á Vestnorden Travel Mart.

Framsýningar- og fundarøkið var býtt soleiðis upp, at útbjóðarar úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi vóru líka sum plaseraðir hvør fyri seg á stóra Scandic Copenhagen hotellinum, men stutt var ímillum fundarborðini og fundarhølini, og gangandi var ímillum hjá øllum

Jóan Karl var einsamalt umboð hjá Ørkini, har hann hevur starvast sum leiðari seinastu 15-16 mánaðirnar.

Hann helt, at tað virkaði kanska eitt sindur undarligt sum føroyingur at vera við í íslendska partinum, tá føroyskir útbjóðarar eisini eru við.

– Men vit eru í Íslandi, og tað er her, vit virka. Mær dámar væl í Íslandi, og vit hava tað gott her yviri. Vit hitta nógv fólk, bæði føroyingar, íslendingar og útlendingar annars, sum koma til landið.



– Um ikki so nógvar avtalur verða gjørdar júst á stevnuni, hevur tú skapt tær nýggj sambond, sum okkurt kann spyrjast burtur úr, tá samskifti partanna millum heldur fram, sigur Jóan Karl Høgnesen, leiðari á Ørkini, sum á Vestnorden Travel Mart eisini hevur havt fundir við ymiskar ferðaskrivstovur í Evropa

Mynd: Vilmund Jacobsen

### Gamalt og nýtt

Jóan Karl sigur, at tá Vestnorden Travel Mart var í Íslandi í fjør, hevði Ørkin bás, men tá var hann lítið við sjálvur, tí hann so nýggjur innan hetta økið.

– Men á stevnuni hesaferð eri eg einsamallur, leggur hann aftrat.

Leiðarin á Ørkini sigur, at tey hava samband við nógvar ferðaskrivstovur og nógv fólk, sum fáast við ferðavinnu.

– Vit vilja tí gjarna vera við, soleiðis at vit í fyrsta lagi fáa høvi at heilsa upp á tey fólk, vit dagliga samstarva við.

Hann ásannar, at ein slík stevna sum Vestnorden Travel Mart í stóra mun snýr seg um at halda verandi sambond við líka.

– Og so vóna vit sjálvsagt eisini at hitta onkran nýggjan keypara, sum hevur hug at koma til Íslands.

### Nógv at bjóða

Jóan Karl sigur, at á ferðavinnustevnuni fært tú nógv sambond, og fleiri fara avstað aftur við faldara, sum sigur, hvat tú hevur at bjóða.

– Um ikki so nógvar avtalur verða gjørdar júst á stevnuni, hevur tú skapt tær nýggj sambond, sum okkurt kann spyrjast burtur úr, tá samskifti partanna millum heldur fram. Eg haldi, at tað er positivt at vera við sum útbjóðari, men um vit skulu verða við, hvørja ferð Vestnorden Travel Mart verður hildin, er so ein annar spurningur, heldur hann.

Leiðarin á Ørkini leggur aftrat, at hann á stevnuni eitt nú hevur havt fýra fundir við ferðaskrivstovur úti í Evropa, og hetta vóru alt fundir, sum eru avtalaðir frammanundan.

> *"Tá Jóan Karl kom til Íslands at arbeiða fyri hálvum øðrum ári síðan, stóðau nógvir stórir kranar og sveiggjaðu í sambandi við ta nógva byggivirksemi, sum var..."*

– Eg haldi, at Ísland hevur nógv at bjóða ferðafólki, sum eitt nú kunnu fara út at hyggja at hvalum, tey kunnu fara fiskitúrar av ymiskum slagi, nógv áhugaverd støð eru at vitja í bussi – og so er tað ikki minst heitu keldurnar og heita vatnið, sum dregur fólk til landið.

### Nógvar gistingar

Á Vestnorden Travel Mart